# Ráðstevna fyri løgfrøðingar

**Í hesum døgum er ráðstevna fyri løgfrøðingar úr øllum norðanlondum í Hotel Hafnia. Tað er Nordic Lawyers Academy (NLA), sum skipar fyri ráðstevnuni. Á skránni eru fyrilestrar og skeið. Dentur verður eisini lagdur á tað sosiala, so at luttakararnir samskipa tað fakligu, sosialu og mentanarligu upplivingina**

NORÐURLENDSK RÁÐSTEVNA

*Orð & Myndir:*
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Løgfrøðingar úr øllum norðanlondum eru í hesum døgum á ráðstevnu á Hotel Hafnia. Tað er NLA, sum skipar fyri ráðstevnuni, og tað er aðru ferð, at ráðstevnan verður hildin.

Endamálið við ráðstevnuni er, at løgfrøðingarnir kunnu deila royndir og vitan gjøgnum tað sosialu samveruna, fyrilestrar og skeið, so at teir kunnu verða betri brynjaðir til nýggju avbjóðingina. Við ráðstevnuni fáa løgfrøðingarnir høvi at hittast á einum meira óformellum støði, har ið kappingarelementið er lagt til viks, og tí vilja teir fegin deila teirra "marknaðarloynidómar".

Løgfrøðingar úr øllum norðanlondum hittast, og stórur dentur verður eisini lagt á tað sosiala og mentanarligu upplivingina í Føroyum. Soleiðis koma fólk eisini at kennast, og løgfrøðingarnir skapa sær eitt netverk av kontaktpersónum í grannalondunum. Tað er heilt vist eisini ein fyrimunur hjá løgfrøðingunum at hava nógvar samstarvsfelagar.

## Ráðstevnan ein succés

Lars Svenning Andersen er ein av fyrilestrarhaldarunum á ráðstevnuni. Hann kemur frá løgfrøðinga-kontórinum "Bech-Bruun", sum er eitt av teimum størstu Danmark.

- Vit kunna hvønn annan um, hvussu vit loysa trupulleikar, og saman kunnu vit soleiðis finna bestu loysnirnar og arbeiðshættirnar. Vit hava nógvar felags avbjóðingar, og tí kunnu vit heilt vist bjóða hvørjum øðrum nakað, sigur Lars Svenning.

Lars Svenning sigur, at tað verður lagdur dentur á tað sosiala, mentanarliga og tað fakliga á ráðstevnuni.

- Ráðstevnan er eitt gott forum hjá okkum at møtast og fáa kontaktir í grannalondunum, sigur Lars Svenning.

- Ráðstevnan verður aftur næsta ár, og tá verða enn fleiri fólk, sigur hann at enda.

*- HeiniK*




*Vit hava nógvar felags avbjóðingar, og tí kunnu vit heilt vist bjóða hvørjum øðrum nakað, sigur Lars Svenning frá Bech-Bruun.*

# Ráðstevnan frígevur orku til eftirútbúgving

**Helle Pallesen, stigtakari til ráðstevnuna, heldur, at Føroyar eru eitt væl egnað stað at hava eina slíka ráðstevnu. Hon sigur, at altjóðagerðin er ein avbjóðing, sum løgfrøðingarnir mugu fyrireika seg til**

NORÐURLENDSK RÁÐSTEVNA

*Orð & myndir:*
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Helle Pallesen er stjóri fyri Advokaternes Service Selskab. Hon er stigtakari til ráðstevnuna, sum í hesum døgum verður hildin í Føroyum.

- Hetta er aðru ferð, at vit hava hesa ráðstevnuna. Fyrstu ferð vóru vit á Svalbard. Tað er ein fyrimunur at halda ráðstevnuna eitt sindur avsíðis, tí at so verða vit ikki órógvað av okkara dagligu uppgávum.

Hella viðurkennir, at løgfrøðingavirkini í norðanlondum eru smá í mun til tey stóru í Evropa. Hendan ráðstevnan skal savna orkuna frá løgfrøðingafeløgunum og geva møguleika til eftirútbúgving og skeið.

- Her kunnu vit møtast á einum meira óformellum støði, og vit kunnu deila ráð og geva og móttaka íblástur. Í gerandisdegnum liggja vit í kapping við hvønn annan, men her kunnu vit samstarva. Vit skulu kanska broyta kappingarelementið, soleiðis at vit ikki liggja í kapping við hvønn annan men heldur standa saman í kappingini við tey stóru London-kontórini, sum gera innrás í Evropa. Altjóðagerðin hevur brotið niður landamørk, og tí kunnu vit vænta okkum harða kapping frá útlendskum kontórum, og vit standa sterkari, um vit samstarva, sigur Helle.

Altjóðagerðin er eitt av høvuðsevnunum á ráðstevnuni. Helle sigur, at tað er ikki tí, at tey eru bangin fyri altjóðagerðini, at tey leggja so stóran dent á tað. Heldur vilja tey fyrireika seg og taka ímóti nýggju avbjóðingini.

Ætlanin er, at ráðstevnan skal vera afturvendandi. Helle vónar, at luttakaratalið fer at vaksa fyri hvørt ár. Næstan øll, sum vóru á Svalbard seinast, eru eisini í Føroyum nú, so tey hava allarhelst verið væl nøgd við ráðstevnuna.



*- Her kunnu vit møtast á einum meira óformellum støði, og vit kunnu deila ráð og geva og móttaka íblástur, sigur Helle Pallesen, stigtakari til ráðstevnuna.*

# Føroyingar eisini við

Tríggir føroyingar luttaka á ráðstevnuni. Ein av teimum er Jógvan Ellefsen frá Advokatfelagnum. Hann er vælnøgdur við ráðstevnuna.

- Her fáa vit møguleika at læra frá hvørjum øðrum og samanlíkna skipanir og lógir. Hóast rættarsamfeløgini líkjast, so eru ymsir munir á, sigur hann.

Jógvan hevur møtt nógvum nýggjum fólki, men hann hevði eisini samstarvsfelagar í øðrum londum áðrenn.

Jógvan Ellefsen er sannførdur um, at útlendsku starvsfelagarnir hava lært okkurt av teimum.

- Vit læra nógv frá teimum, men tað gongur heilt vist báðar vegir. Vit hava eisini royndir og førleikar, sum tey kunnu læra av, sigur Jógvan.

Petur Ellefsen vil heilt vist ráða øðrum løgfrøðingum til at fara á eina slíka ráðstevnu.

*- HeiniK*



*- Vit læra nógv frá teimum, men tað gongur heilt vist báðar vegir. Vit hava eisini royndir og førleikar, sum tey kunnu læra av, sigur Jógvan Ellefsen frá Advokatfelagnum. Jógvan tosar her við ein av sínum donsku starvsfeløgum. Jógvan stendur vinstrumegin á myndini.*

## Rætting

Í blaðnum í gjár var grein við yvirskriftini "Eingin umbering". Í greinini vóru tvey nøvn komin skeivt fyri. Har stóð, at Jákup í Stórustovu var redaktørur á sjónvarpinum týsdagin, og at Georg Samuelsen gjørdi innslagið. Hetta er sjálvandi ikki rætt. Høgni í Jákupstovu var redaktørur og Goerg L. Petersen hevði gjørt innslagið.

Vit biðja um umbering og biðja lesaran halda okkum til góðar.